


*Alti Danielsen tryggjaði KÍ javnleikin, tá Skála vitjaði á norðoyastevnu, og tá KÍ so vann eftirfylgjandi brotssparkskappingina, fingu teir eisini steyp fyri avrikið*

*Mynd: SáH*

KÍ-Skála 1-1 (0-1):

# Tað kemur lítið upp á loggið

**Skála kendi ikki sína vitjunartíð, tá ið teir í fyrra umfarinum vóru greitt omaná vertunum á Norðoyastevnu, og so reið um snarið eftir steðgin**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eingin ivi var um, at tað var Norðoyastevna, og at tað harvið var KÍ, sum átti heimavøll. Men serliga í 1. hálvleiki sást hetta ikki á spælbýtinum, og áskoðararómurin bendi nógv meiri á, at tað var Skála, sum kundi eiga heimavøll. Skálalitt uppsløg vóru alla staðni, og vitjandi áskoðararnir vóru í skýlinum støðugt meiri mælskir, enn teir hjá heimaliðnum vóru.

At Skála spælararnir ikki leggja einki í stuðulin, og at teir rokna hann týdningarmiklan, sást, tá ið teir eftir síðsta bríkslið fóru norður undir skýlið og takkaðu.

Eftir síðsta bríkslið tóktist tað ikki sum um, at skálamenn vóru so harmir um, at tað ikki hevði eydnast teimum at vinna. Seinna partin av 2. hálvleiki vóru teir í 5-4-1 uppstilling. Bogi Gregersen var á miðvøllinum, og Jonhard Frederiksberg var einsamallur í álopinum, har hann arbeiddi nógv.

Klaksvíkingar gjørdu nógv mistøk, og tá ið Skála fangaði bóltin í sovornum støðum, vóru teir sera vandamiklir í skjótálopum. Sum hvirluvindar søktu teir at, men teir fingu ikki sigursmálið. Fleiri ferðir restaði yvirblikkið, sum kravdist fyri at leggja sendingina, ið skuldi spæla KÍ verjuna púra tunna, og tá ið teir ta einu ferðina fingu bóltin í høgra borð og løgdu flatt innfyri, misnýttu teir. Liðformaðurin, Pauli G. Hansen, sum aftur hesa ferð var rættuliga sentralur, var blankur við handara stólpan, men fimm metrar úr málinum sendi hann skeivu megin stólparótina.

Fyrra umfarið var Skála greitt omaná. Kanska var samanspælið ikki støðugt so skjótt, sum tað hevur verið fleiri aðrar ferðir fyrr í ár. Men teir arbeiddu nógv, bjóðaðu seg til og funnu væl hvønn annan. Uppskriftin við síðuskiftum og skjótum snaringum og vendingum var ikki so sjónsk hesa ferð, sum onkra aðra ferðina, men tað var kortini væl meiri ferð, tyngd og samanhangur í hjá Skála.

Jónhard Frederiksberg var sera eyðsýndur sum fremsti maður, og tað eydnaðist honum at leggja Skála framum tíggju minuttir fyri hálvleik. Um miðstrikuna í høgra borði vann hann bóltin. Mótstøðumenninir tóktust ikki hava hug at takla. Teir hopaðu undan, og so setti landsliðsmaðurin ferð á. Hann sneiddi framvið onkrar, og tá ið hann var komin fram ímóti brotsteigarmarkinum smekkaði hann til, og bólturin fór flatt dygst inn við stólparótini. Stutt frammanundan hevði Skála givið klaksvíkingum eina ávarðing, men ta ferðina fekk Jákup Mikkelsen akkurát beint bóltinum til horna.

Hóast Skála í 1. hálvleiki vísti so nógv betri liðavrik enn heimaliðið, so hevði KÍ tveir stórar møguleikar at fáa mál. Í fyrra førinum drønstútaði Ovi Nysted eftir horna og dygst við síðuna av, og í seinna førinum heilfluktaði væl upplagdi Eyðun Klakstein eftir innlegg úr høgru og við handara stólpan dygst við síðuna av.

### Hugflogið og tyngdin resta

Higartil í ár hevur tað næstan hvørja ferð verið soleiðis, at KÍ hevur strítt seg upp á javnleik, eftir at mótstøðuliðið hevur lagt seg framum. Soleiðis var tað eisini hesa ferð. Eftir steðgin var hugburðurin hjá KÍ betri. Teir vunnu fleiri nærdystir, og teir vóru oftari fyrri á returbóltunum, enn teir høvdu verið undan steðginum. Men teir vístu ikki nógv samanhangandi fótbóltsspæl.

Við vandanum fyri at taka seg sjálvan upp í saman skal bara stutt staðfestast, at teir høvdu ógvuliga torført at finna hvønn annan. Einfaldar og stuttar sendingar vóru óneyvar, og tað tóktist vera torført og næstan ógjørligt at spæla seg úr verjuni og umvegis miðvøllin, tá ið roynt varð at fara í álop. Tað, sum ikki var stórvegis trupulleiki hjá mótstøðuliðnum, var ógvuliga torført hjá KÍ, sum oftast sparkaði høgt og langt í vónini um, at fremstu spælararnir skuldu fáa tak á.

Men KÍ stríddi seg eftir steðgin upp í part. Gongdin bendi á, at um teir skuldu fáa mál, so skuldi tað verða í sambandi við deyðbóltsstøðu, og soleiðis var tað eisini. Atli Danielsen, sum stríddist nógv, var hægstur, eftir at Eyðun Klakstein hevði sent hornaspark úr høgru og innfyri. Bólturin var farin út frá aftur, hann varð rættuliga høgt lossaður aftur í málteigin.

KÍ vann brotssparkskappingina um Norðoyastevnusteypið, og lagið tóktist ikki av leið. Men javnleikur omaná javnleik og fýra stig í fimm teimum seinastu uppgerðunum boða ikki frá, at Klaksvíkar Ítróttarfelag skal halda hundrað ára føðingardag í absolutta toppinum. Har er Skála framvegis at finna.

## FAKTA UM DYSTIN

**KÍ-Skála 1-1 (0-1)**
0-1: Jónhard Frederiksberg 35.
1-1: Atli Danielsen 58.
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**KÍ:** Jákup Mikkelsen – Leon Bjartalíð, Niclas Niclassen, Ovi Nysted, Marek Wierzbicki (Jan Andreasen, 68.) – Arnhold Joensen (Símun Joensen, 46.), Jan Joensen, Atli Danielsen, Eyðun Klakstein – Stig Edvin Aksnes (Erling Fles, 27.), Jacob Bymar
**Gult kort:** Eyðun Klakstein
**Skála:** Igor Bjarni Kostic – Bárður Danielsen, Arnhold Berg, Rúni Rasmussen, Iulian Florescu – Hanus Thorleifsson, Pauli G. Hansen, Nenad, Alexandur Johansen – Bogi Gregersen, Jónhard Frederiksberg



EB/Streymur-ÍF 7-0 (2-0):

# Fuglfirðingar avbyrgdir

**Við einum knúsandi sigri staðfestu EB/-Streymur, at teir ikki ætla sær at róta í nøkrum botnstríðið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

»Botnstríð á Eiði« var heitið á upptaktsgreinini, sum vit høvdu í leygardagsblaðnum. Stigatalvan stuðlaði eisini uppundir hesa útsøgn, tí liðini lógu sum ávíkavist nummar átta og níggju, og tað stóð eisini greitt, at ein møguligur tapari av dystinum skuldi fara sær ein túr undir niðurflytingarstrikuna.



*Við trimum málum var Sorin Anghel høvuðsmaðurin hjá EB/Streymi í trivaliga sigrinum á ÍF*

### Byrjaðu sum óløgi

Men eitt er, hvat tøl, talvur og forsøgnir siga. Annað er, hvat verður sýnt í verki, og her varð skjótt staðfest, at EB/Streymur í øllum førum ikki hevði nakrar sum helst ætlanir um, at verða hangandi í botninum.

Heimamenninir løgdu fyri sum eitt óløgi, og longu í fyrsta minuttinum høvdu teir góðan møguleika at leggja seg á odda. Teir máttu tó bíða, til tíggju minuttir vóru lidnir, áðrenn teir fingu fyrsta málið. Sorin Anghel fekk bóltin stungnan inn um verjuna, og tó at hann tóktist hava mist møguleikan, so eydnaðist honum at toyggja seg fram og kippa bóltin upp um ÍF-málverjan.

Og teir hildu fram – EB/Streymur. Allan fyrra hálvleik var talan um støðugt trýst oman móti ÍF-málinum. Kanska vóru møguleikarnir ikki heilt so nógvir, men enn eitt mál lá alla tíðina í luftini, og á hálva tímanum slerdi rumenski álopsmaðurin aftur til. Hesa ferð byrjaði Sorin álopið sjálvur, og tá Bárður Olsen so sendi flatt innfyri, fekk Sorin sera hegnisliga snarað bóltinum í kassan við nærmasta stólpa.

### Tvey reyð og skrædl

Eftir steðgin tóktist tað ganga eitt sindur meira javnt. Fuglfirðingarnir høvdu nú skipað seg nakað betri, og vertirnir høvdu nú eisini tikið seg eitt vet longur aftur á vøllin, og fyrstu 20 minuttirnar tóktust ikki nakrar stórvegis broytingar soleiðis at koma í støðuna.

Men broytingarnar komu tó í yvirmát. 20 minuttir inn í seinna hálvleik fekk EB/-Streymur tillutað brotsspark, tá ein leysur Sonni L. Petersen varð feldur, og at ÍF samstundis misti Bartal Eliasen, kom heilt illa við hjá teimum. At fuglfirðingarnir eisini lættliga kundu fingið onkra aðra útvísing um sama mundið, er ein onnur søga, men Sonni lat so ikki við seg koma. Hann tók sær sjálvur av brotssparkinum, og so var at kalla eingin vegur aftur hjá ÍF.

Og tá teir so bara fáar minuttir seinni mistu Fritleif í Lambinum, tá hesin framdi eina sera ófantaliga tackling, kom skrædlið.

EB/Streymur fekk møguleikan at flyta nógv fólk niðan, og í royndunum at betra sær um málmunin, tóku teir eisini av. Sorin gjørdi hat-trick, tá hann stútaði innlegg úr høgru í kassan. Sonni varð enn einaferð blankur, tá hann økti til 5-0, og eftir at álopsleikararnir soleiðis høvdu gjørt sítt, traðkaðu nakrir av verjuleikarunum síðani til. Fyrst var tað Gert Hansen, sum smekkaði til, tá bólturin varð sendur innfyri, og móti endanum var Fróði Clementsen fyrstur á returinum, eftir at Sorin hevði stútað á yvirleggjaran.

### Skerdir til botnslagið

Og skal metast eftir talvuni, so er EB/Streymur so ikki nakað botnlið longur. Tvørtur ímóti lyftu teir seg upp um miðjuna við sigrinum, og einki er at ivast í, at fótbóltslagið nú er nakað nógv betri har um leiðir. Tað sá annars einki serligt út eftir tungu byrjanina, har dystir móti B36, HB, KÍ og VB bert kastaðu eitt stig av sær, sum teir sjálvir tóku til, so vóru hesir dystirnir ikki teir lættastu at byrja við.

Hjá ÍF stendur hinvegin einki til. Greiða tapið hesaferð hevur meira ella minni viðført, at liðið nú er avbyrgt frá teimum átta ovaru, og kravið er nú heilt einfalt, at trý stig skulu á borðið komandi vikuskifti.

Tá er talan um veruligan botndyst, tá stigaleysa B68 vitjar í Fuglafirði. Einki er at ivast í, at ÍF á pappírinum eru favorittar til hendan dystin, men nú hava teir so sjálvir syrgt fyir at skerja liðið munandi undan uppgerðini, har altso hvørki Bartal Eliasen ella Fritleif í Lambanum vera við, og tað kann gerast tung frávera.

## FAKTA UM DYSTIN

**EB/Streymur-ÍF 7-0 (0-2)**
1-0: Sorin Anghel, 10
2-0: Sorin Anghel, 32
3-0: Sonni L. Petersen (br.), 65
4-0: Sorin Anghel, 77
5-0: Sonni L. Petersen, 80
6-0: Gert Hansen, 84
7-0: Fróði Clementsen, 89
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Carl H. Høgnesen, Fróði Clementsen, Andrzej Pacek (Knút Vesturdal, 73.), Esmar Eiðisgarð (Gert Hansen, 70.) – Bárður Olsen, Jákup Martin Joensen, Hans Pauli Samuelsen, Hallur Jacobsen (Marni Djurhuus, 65.) – Sorin Anghel, Sonni L. Petersen.
**ÍF:** Kartin Joensen – Fritleif í Lambanum, Viggo Johannesen, Áki Petersen (Árni Petersen, 38.), Rúni Elttør (Eyðun Ryggshamar, 68.) – Eyðolvur Petersen, Roy Róin (Høgni á Lakjuni, 55.), Høgni Zachariassen, Bárður á Lakjuni – Bartal Eliasen, Magni á Lakjuni.
**Gult kort:** Bartal Eliasen, ÍF (30. og 63.), Rúni Elttør, ÍF, (64.)
**Reytt kort:** Bartal Eliasen, 63., Fritleif í Lambanum, 66.
**Dómari:** Birgir Sondum

## Sjálvsálitið endurvunnið



Ein av nýggju monnunum hjá EB/Streymi er verjuleikarin, Fróði Clementsen, sum undan kappingarárinum kom úr B36, har hann tóktist hava ilt við at fáa spælitíð.

Tí er einki at ivast í, at tað hjá honum mundi kennast eyka søtt, tá hann sunnukvøldið fann útav, at júst hansara mál fyri fyrst sendi EB/-Streym upp um B36 á stigatalvuni.

– Tað var onkur, sum segði mær tað eftir dystin, so tað var bara stuttligt, at júst mítt mál skuldi gera tað, helt hann, tá vit spurdu hann um hetta.

– Men fyrst og fremst, so var tað ein ótrúliga týdningarmikil sigur hjá okkum. Seinasta vikuskifti hálvgum stjólu vit trý stig í Gøtu, men hesaferð var so eingin ivi. Sjálvsálitið er við at koma aftur á liðið, og tað merkir, at leikararnir tora at spæla fótbólt.

Men tá vit at enda spurdu Fróða, hvørt teir nú fara at tosa um ovaru plássini á talvuni, helt hann, at so langt hevði hann ikki hugsað.

– Fyrst og fremst ráddi um hjá okkum at vinna hendan dystin. Nú fara vit so til Runavíkar næsta vikuskifti, og so fáa vit at síggja, hvussu tað fer at spæla av, helt høvuðssterki verjuleikarin at enda.

**-jm**